# Kjak



Annita á Fríðriksmørk

## Ungdómur og vísdómur...

Síggi, at Kári á Rógvi fílist á, at Fróðskaparsetrið á fíggjarlógini fyri 2011 helt stand.

Skal minna hann á, at uppskot var um at lækka ta játtanina við 4 mió kr. Varð eingin semja í fíggjarnevndini um tað málið, varð Setrið skorið við 4 mió krónum! Tá hevði Setrið ikki verið ført fyri at tikið inn teir næmingar í 2011, sum Setrið nú er ført fyri, - takka verið fíggjarnevndini og undirtøkuni í Løgtinginum.

(Tó taldist atkvøðan hjá KáR ikki við í hesum meiriluta, tí hann var jú ímóti...)

Ikki bara umsorganin fyri Setrinum er honum ein trupulleiki. Eisini Havrannsóknarskipið (sum samt løgting í vár samtykti skuldi hava 25 mió kr í 2011) og Tjóðpallurin. Nú er hetta ein rossahandil, sigur hann. Men her átti ein formaður at gjørt sær sínar egnu metingar, - og ikki bara endurgivið - , um hvørt hann heldur, at tað er ein rossahandil, táið ein fólkavald(ur) fær floksins raðfestingar á fíggjarlógin.

### Raðfestingar ella rossahandlar

Trupulleikin sigur Kári m.a verða, at vit útihýstu Saltsiloini á Drelnesi á fíggjarlógini.

Hví Kári á Rógvu hevur trupulleikar av, at Saltsiloin varð útsett til 2012, tá ið vit ístaðin m.a.raðfestu Tjóðpallin Fróðskaparsetrið og Havrannsóknarskipið umframt kirkjuna og sjósavnið osfr – tað skilji eg ikki.

Men sama ger, uppskot okkara varð samtykt. Og so má hann gjarna velja at kalla Saltsiloina á Drelnesi fyri raðfesting og restina fyri rossahandil.

### Eftir manninum heldur enn eftir bóltinum

Tað er væl skiljandi mótstøða móti tí handfaring, sum fíggjarlógin fekk tollaksmessuaftan. Tað líktist ongum. Eisini tí atkvøddu nøkur ímóti at koyra 2. og 3. viðgerð ígjøgnum sama dag. Men táið hetta kortini varð samtykt, og Kári nú hevur lisið álitið hjá fíggjarnevndini, sær hann, at eisini andstøðan í fíggjarnevndini fekk søguligar góðar batar samtyktar.

Hetta vil hann ikki viðganga nú, tí hann var jú ímóti tá.

Ístaðin roynir hann, at niðurgera andstøðulimirnar í nevndini, og ballar sína mótstøðu inn í løgfrøðiligar mannagongdir, og konstitutionellar siðvenjur úti í heimi.

### Kennir siðvenjur men praktiserar óvanar

Siðvenjur, sum forrestin átti at komið einum til hugs, táið til dømis misálit verða løgd fram á landsstýrisfólk. Ella um sína egnu uppmøting, tá ið eins egnu uppskot eru til atkvøðugreiðslu í løgtingssalinum.

Men hví ikki bara skriva um siðvenjur aðrastaðni, tá ið veruligi persónligi trupulleikin er manglandi grundgevingar fyri mótstøðuni tollaksmessuaftan. Tá er ikki annað at gera enn at skjóta í flokk

Hann atkvøddi jú ímóti øllum. Ikki bara ímóti at koyra alt ígjøgnum sama dag. Men eisini ímóti fíggjarlógini. Og enntá ímóti álitinum.

Jú, okkurt er, sum sjálvdan fylgist at!



Óli Mikkelsen
*lækni*

## Klaksvíksgingar á herferð

Nú skola herindi av landnyrðingi. Neyvan dagur at ikki onkur stubbi er í bløðunum um skúla- ella sjúkhúsverk.

Dimma 10. januar hevur fýra greinar um Klaksvíkar Sjúkrahús.

Í mínari tíð sum lækni hevur hetta fyribrigdi stungið seg upp mangar ferðir. Tá ein politikari í Norðoyggjum nevnir Klaksvíkar Sjúkrahús, kunnu hinir ikki sita á rumpuni. Allir kappast um at vera bestir, og orðavalið hevur ikki altíð verið serliga sáttligt. Mest umráðandi hevur verið at krevja okkurt, at royna at fáa fólkið uttan fyri Havnina í sín part, og so í hernað móti Havnini. Landssjúkrahúsið verður gjørt til sjúkrahúsið í Havn.

Í løtuni er høvuðskravið at seta urologiska serdeild á stovn í Klaksvík. Nú er rætta løtan til hetta krav, tí klaksvíksgingar eiga heilsumálaráðharran. – Hesin góði maður hevur eisini gjørt seg sjálvan moyran, tí eitt tað fyrsta hann gjørdi í starvinum, var at flyta OKKURT til Klaksvíkar.

Tey seinastu árini er vitanin um sjúkur og sjúkuviðgerð økt við rúkandi ferð, serliga tí framkomin og ofta teldustýrd tól til kanningar og viðgerð eru komin. Í kjalavørrinum av hesum eru serdeildirnar komnar, so sjúklingarnir kunnu fáa bestu viðgerð á ávísum øki.

Í grannalondunum verður alla tíðina ansað eftir sjúkhúsverkinum. Serdeildir verða savnaðar á størri og størri eindum, tí neyðugt er at samstarva so sjúklingarnir fáa bestu og tryggastu viðgerð. Umráðandi er eisini, at samfelagið fær størstu nyttu av teimum dýru sjúkrahúsunum.

Seinasta greinin í nevndu Dimmu er skrivað av Hans Paula Strøm, fyrrverandi heilsumálaráðharra.

Hans Pauli leggur dent á, at tað er hann sjálvur og ikki Jákup Mikkelsen sum hevur hjálpt Aksel Johannesen við fyrireikingunum til urologiska serdeild í Klaksvík.

»*Hetta arbeiðið er nú gjørt og út frá heilsufakligu tilráðingini viðger landsstýrismaðurin nú tilmælið*« - sitat endað.

### Hvat ólukkan er hetta fyri nakað? Hvat er heilsufakliga tilráðingin?

Tað sæst at teir hava tosað við ein urolog. Er hetta nóg mikið til at seta serdeild á stovn.

Hans Pauli veit væl og helst eisini Aksel, at her verður arbeitt ímóti tilmælum frá heilsustýrinum um serdeildir.

At tveir heilsumálaráðharrar sláa seg saman og forbrongla sjúkhúsverkið til lokalpolitikk av grovasta slag, treingir til eina neyvari kanning beinanvegin.

At Hans Pauli hevur hjálpt Aksel at fáa eina millión til ryggambulatorium í Klaksvík er eitt minni mál, men bendir á sama borðið.

Føroyska samfelagið er nógv merkt av anarki. Verður einki gjørt her, fer samfelagið eitt risalop skeiva vegin.

Við vón um gott nýggjár.



Edmund Joensen
*Løgtings- og fólkatingsmaður fyri Sambandsflokkin*

## Toppkarakter til Ríkisfelagsskapin

Sjálvt fullveldisfólk og misskiltir nationalistar, hvørs uppspardu pengar eisini eru bjargaðir, mugu nú viðganga sannleikan: vit hava innrættað okkum væl í Ríkisfelagsskapinum.

Allir føroyingar munnu fegnast um, at søgan um Eik Banka er endað so væl, sum vit nú síggja.

Sum kunnugt, er bankin seldur einum sterkum føroyskum samtaki, ið lovar at reka bankan varligari enn undarfarna leiðslan, ið má átaka sær ábyrgdina fyri, at bankin í fjør fór á húsagang.

Hitt mest gleðiliga er, at sorgarleikurin um Eik Banka er farin fram, uttan at tað hevur elvt til nakað skrædl í Føroyum. Stabiliteturin hevur verið varðveittur. Uppsparingin hjá føroyingum er intakt, og bankin hevur verið virkin alla tíðina innan fyri Finansiel Stabilitet, meðan óvanliga støðan hevur verið.

Nú er støðan normaliserað aftur, og tað er sera týðandi fyri okkum í Føroyum.

Hetta er gingið júst eftir bókini, hóast summi hava roynt at billað fólki okkurt annað inn.

Søgan um húsagangin hjá Eik Banka er eisini søgan um, at Ríkisfelagsskapurin hevur staðið royndina – við toppkarakteri! Bankapakkarnir í Ríkinum, samstarvið í Fólkatinginum og góðu viðurskiftini millum leiðsluna í landsstýrinum og donsku stjórnina eru komin øllum føroyingum og samfelagnum til góða, tá ið brúk var fyri tí.

Allar atfinningar og illgitingar ímóti okkara samstarvsfeløgum í Ríkisfelagsskapinum eru við hesum gjørdar til skammar.

Sjálvt fullveldisfólk og misskiltir nationalistar, hvørs uppspardu pengar eisini eru bjargaðir, mugu nú viðganga sannleikan: vit hava innrættað okkum væl í Ríkisfelagsskapinum. Tí eiga vit eisini at varðveita og útbyggja felagsskapin.

Hugsið tykkum, hvussu støðan hevði verið, um Tjóðveldi og Javnaðarflokkurin í 2008 høvdu fingið stundir at yvirtikið fíggjarøkið? Tá høvdu vit havt fíggjarligt kaos í Føroyum – eins og í Íslandi.

Eitt stórt tillukku til TF Holding. Tit hava keypt ein sunnan banka fyri ein rímiliga bíligan pening. Vónandi stýra tit Eik Banka varliga og við hepnari hond.

Toppkarakter til Ríkisfelagsskapin!